## Aðra fiskiveiðiskipan

Tríggir tinglimir hava lagt uppskot fyri íslendska Altingið um at seta verandi fiskiveiðiskipanir úr gildi. Teir skjóta upp, at verandi skipanir fara úr gildi tann 1. september í 2010, so at tann politiski myndugleikin skal fáa srundir til at koma við einari aðrari skipan til ta tíð. Tingmenninir eru ikki einsamallir. Millum annað hevur íslendska skiparafelagið sagt, at verandi reglur mugu broytast, tí tær gera enda á fiskivinnuni.



*Ísland má fáa eina aðra fiskiveiðiskipan, heldur skiparafelagið*

*Mynd: Vísir*



*Alv-skúlin við Áir hevur tilboð til næmingar, ið ynskja at nema sær útbúgving í 9. floksútbúgving og FHS*

# Hvat er ALV ?

**Alv er ein endurbúgvingarstovnur ið varð stovnaður av Færøernes Ulykkeforsikring fyri fimmti árum síðani. Endamálið hjá stovninum er millum annað at royna arbeiðsevnini hjá arbeiðstarnaðum og at skipa fyri arbeiðsvenjing, endurbúgving og umskúling, so vinnutarnað aftur kunna fara til arbeiðis.**

Endurbúgvingartilboðini hjá Alv eru skipað í 7 virksemi:

- Vinnuskeið: Vinnuskeiðstilboðið er ætlað teimum, sum hava útlit til at megna eitt starv á vanliga arbeiðsmarknaðinum ella koma víðari í útbúgving.
- Verkstaður: Verkstaðið er ætlað pensjónistum, ið hava tørv á einum verkstaðsarbeiði.
- Kvøldvirksemi: Kvøldvirksemið er tilboð til pensjónistar, sum hava tørv á at koma saman við øðrum og fáa ein innihaldsríkari gerandisdag.
- Vinnudeildin: Fær til vega vart arbeiði til fyritíðarpensjónistar, umframt at etablera starvsvenjingarstað og arbeiði til næmingar.
- Heimavirkan: Heimaarbeiðandi pensjónistar, sum framleiða vørur.
- Handil og Kaffi: Handil, sum selir ymisk sløg av vælbryggjaðum kaffi, og sum eisini selir vørur frá okkara framleiðslum og frá heimapensjónistunum. Eisini virkar Handil og Kaffi sum starvsvenjingarstað.
- Skúlin: Tilboð til næmingar, ið ynskja at nema sær útbúgving í 9. flokki og FHS.

# Arbeiðspláss til fólk v

**- Við virkseminum, sum verður á Kambsdali, hava vit nátt flestu økir í landinum, men vit røkka ikki Suðuroynni á hesum umfari. Vit fara at kanna tørvin í Suðuroy nærri og hava síðan ætlanir um at seta virksemið í gongd har seinni, sigur Alv. Sjálvognarstovnurin hevur keypt virkisbygning frá Fuglafjarðar kommunu, sum ætlandi fer at geva 25 førleikaskerdum fólum arbeiði**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sjálvsognarstovnurin Alv hevur júst keypt ein virkisbygning, sum Fuglafjarðar kommuna hevur átt á ídnaðarøkinum á Kambsdali.

Bygningurin er 600 fermetrar til víddar, og grundøkið er 2.870 fermetrar stórt. Keypsprísurin er 1,9 miljónir krónur, og stovnurin væntar at brúka 2,5 miljónir krónur til at gera bygningin kláran til tað virksemi, sum ætlanin er at brúka hann til.

- Hetta er eitt stig á leiðini hjá okkum at fremja kor teirra, ið hava skerdan arbeiðsførleika, og vit halda, at hetta er ein góður framtíðarmøguleiki. Bygningurin stendur á vinnuøkinum á Kambsdali, sum vit meta er eitt gott stað, tá hugsað verður um at bjóða virksemi til arbeiðstarnað í Norðoygg-jum, Eysturoy og part av Norðurstreymoy.

### Klárur um eitt ár

Stovnurin heldur tað eisini hava stóran týdning fyri samstarvið við aðrar fyritøkur, sum eitt nu eru á Kambsdali, at virkisbygningurin liggur so tætt upp at aðrari vinnu.

- Eitt annað, sum eisini er til fyrimunar við plaseringini á Kambsdali, er góða busssambandið, og eitt nú koyrir leið 440 úr Klaksvík nógvar ferðir um dagin.

Alv hevur leingi havt ynski um at skapa uppaftur fleiri vinnumøguleikar fyri fólkum við skerdum arbeiðsførleika, og stovnurin metir, at keypið á Kambsdali fer at geva hesum fólkum góðar og øktar møguleikar.

- Vit fara í næstum undir at gera bygningin kláran til okkara virksemi, og vit miðja eftir at byrja framleiðslu á Kambsdali um eitt ár ella so. Ætlandi verður pláss fyri 25 arbeiðsfólkum, sigur Alv.

Tá arbeiði at umbyggja og laga bygningin til ætlaða virksemið er komið nakað áleiðis, fer Alv at skipa fyri kunningarfundi, so øll, ið hava áhuga, kunnu skráseta seg ella fáa nærri upplýsingar um virksemið, sum verður.

### Møblar og montasja

- Høvuðsinnihaldið við virkseminum á Kambsdali verður ein endurnýtsluhøll ella ein sokallað "møbladeild", har vit eitt nú fara at umvæla gamlar møblar og lutir, sum skulu seljast. Sumuleiðis hava vit ætlanir um at virka sum eitt "montasju virki", har vit fara at framleiða ymiskar lutir ella partar av framleiðslulutum fyri føroysk virkir. Tað vísir seg nevnliga, at føroysk virkir bíleggja fleiri framleiðsluvørur og tænastur uttanlands, sum eins væl kundu verið framleiddar í Føroyum.

Alv ynskir at hyggja at hesum møguleika við tí fyri eyga at skapa eina nýggja vinnu.

- Vit hava tosað við virkir um møguleika fyri framleiðsluavtalu, og tað vísir seg, at áhugi er fyri hesum. Vit vænta eisini, at eftirspurningurin verður størri, tá vit eru komin í gongd. Eins og í Havn, er ætlanin at gagnnýta hølini, tá hesi eru tóm til ymiskt virksemi seinnapartar og um kvøldarnar.

### Arbeiðsmarknaðurin

Alv fegnast um, at hetta nýggja virkið sær dagsins ljós – ikki minst tí, at virksemi fer at verða við til at gera arbeiðsmarknaðin enn meira rúmligan.





*Alv hevur keypt virkisbygningin frá Fuglafjarðar kommunu fyri 1,9 miljónir krónur, og væntandi fer sjálvsognarstovnurin at brúka umleið 2,5 miljónir krónur til at gera hann kláran til brúk*